ALS

Arbeiðsloysisskipanin
The Faroese Employment Office

# UMSÓKN

## um arbeiðsloysisstuðul (fiskimenn)

## Leiðbeining

**Tú hevur rætt til arbeiðsloysisstuðul frá tí degi, tú:**

- er arbeiðsleysur og mótvegis Arbeiðsloysisskipanini prógvar, at so er, tó í fyrsta lagi frá tí degi Arbeiðsloysisskipanin hevur móttikið skrivliga umsókn,
- er tøkur á arbeiðsmarknaðinum og arbeiðsførur at átaka sær eitthvørt fulltíðarstarv,
- hevur bústað í Føroyum og,
- ikki er sjálvstøðugt vinnurekandi sambært § 12, stk. 6

Í sambandi við at tú fært útgoldið arbeiðsloysisstuðul, hevur tú skyldu til at taka av øllum arbeiði, sum arbeiðsávísingin hevur til tín, og sum tú hevur fakligan førleika til. Í hesum sambandi eru allar Føroyar at rokna sum ein arbeiðsmarknaður, tvs. at tú mást vera til reiðar at átaka tær arbeiði allastaðni í Føroyum.
Seinast dagin eftir at eitt arbeiði verður ávíst, skalt tú kunna byrja arbeiðið.

Um tú noktar at taka av arbeiðstilboði uttan serliga orsøk, missir tú rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur. Um tú ikki ert at meta sum tøk/ur á arbeiðsmarknaðinum, verður tú koyrd/ur úr skipanini, og missir sostatt rættin til útgjald.
Eru heilsuligar orsøkir, sum gera, at tú ikki kanst átaka tær eitt og hvørt arbeiði, skal læknavátta vera til skjals.

**Skjøl, sum skulu latast inn saman við umsóknarblaðnum:**

**Løntakarar og onnur:**

- Veiðiloyvi
- Váttan um umvæling av skipi

**Sjálvstøðug vinnurekandi:**

- Sjálvuppgáva og skattaroknskapur fyri síðst lokna roknskaparár, undan arbeiðsloysinum. Harumframt neyðug skjøl, sum prógva, at persónliga arbeiði títt í virkinum er hildið uppat.

Umsóknarblaðið skal fyllast út nágreiniliga. Vanta upplýsingar ella neyðug skjalprógv, loyvir Arbeiðsloysisskipanin eini 14 daga freist, frá tí at umsókn er móttikin á ALS, til at útvega neyðugu skjølini. Annars fellur umsóknin burtur.

ALS hevur heimild til at útvega allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti tíni, herundir eisini upplýsingar frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Um tú gevur okkum skeivar upplýsingar ella tegir um umstøður av týdningini fyri rættindi tíni til arbeiðsloysisstuðul, kunnu upphæddir, sum av órøttum eru útgoldnar, verða kravdar afturgoldnar. Somuleiðis kanst tú verða revsað/ur við sekt ella hefti.

Set teg í samband við ALS og fá nærri at vita, um tú ivast.

Vinarliga fyll umsóknarblaðið út við spjaldrastavum.

**1**

| | | |
|---|---|---|
| Føðingardagur og P-tal | | Tel. / |
| Navn | | |
| Býlingur/Gøtunavn nr. | | |
| Postsmoga | Postnr. | Býur/bygd |
| Teldupostur | | |
| Ert tú føroyskur ríkisborgari?<br>**JA** ☐ **NEI** ☐ Um nei, hvar ert tú ríkisborgari? | | |

ALS

## 2 Orsøk til arbeiðsloysi

| | |
|---|---|
| **Skipið er lagt vegna umvælingar** ☐ (Váttan um at skipið er til umvælingar skal vera til skjals) | |
| Nær var seinasti arbeiðsdagur: | |

## 3 Arbeiðsførleiki v.m.

| | | |
|---|---|---|
| **Kanst tú, uttan heilsuligar avmarkingar, átaka tær eitt og hvørt fulldagsstarv, tú hevur fakligan førleika til?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| Um nei, skalt tú grundgeva hví (læknaváttan skal vera til skjals): | | |
| | | |

## 4 Arbeiðsvilji

| | | |
|---|---|---|
| **Ert tú sinnað/ur at átaka tær eitt og hvørt arbeiði, ávíst av Arbeiðsloysisskipanini, og sum tú hevur fakligan førleika til?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |

## 5 Barnaansing

| | | |
|---|---|---|
| Hevur tú børn, ið hava tørv á barnaansing? | **Ja** ☐ | **Nei** ☐ |
| Um ja, hevur tú barnaansing? | **Ja** ☐ | **Nei** ☐ |

## 6 Undirvísing

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Luttekur tú í undirvísing (t.d. fólkaskúla, student, HF ella aðrari undirvísing)?** | | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| Um ja, hvørjari: | Nær á degnum: | | |

## 7 Sjálvstøðugt vinnuvirksemi

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hevur tú sjálvstøðugt vinnuvirksemi?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ | Møguligt V-tal: |
| **Hevur tú havt sjálvstøðugt vinnuvirksemi?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ | Møguligt V-tal: |
| **Hevur tú teknað arbeiðsloysistrygging sum sjálvstøðug/ur vinnurekandi?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ | |

## 8 Vinna uttanlands / útbúgving

| | | |
|---|---|---|
| **Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið í vinnu uttanlands?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| **Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið limur í norðurlendskari arbeiðsloysistrygging?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| **Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið undir útbúgving?** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| Um ja, skal nærri frágreiðing skrivast her: | | |
| | | |

## 9 Hevur tú í løtuni rætt til, ella hevur tú søkt um onkra av niðanfyri nevndu veitingum?

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Barsilspening** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ | **Útbúgvingarstuðul** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| **Sjúkradagpening** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ | **Løn fyri ansan av óhjálpnum heima** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| **Fyritíðarpensjón**<br>Um ja, hvat slag? Lægstu ☐ Miðal ☐ Hægstu ☐ | **JA** ☐ | **NEI** ☐ | **Aðrar veitingar/pensjónir/eftirlønir**<br>Um ja, hvørja og frá hvørjum? | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |

## 10 Hvagar skal arbeiðsloysisstuðulin flytast?

| Navn á peningastovni: | Kontunummar: | | | | - | | | | | | | |
|---|---|

## 11 Limagjald til fakfelag

Ynskir tú, at ALS, tína vegna, skal flyta limagjald (prosentgjald) av arbeiðsloysisstuðlinum til fakfelag títt?

**NEI** ☐ **JA** ☐ Um ja, fakfelag: Limanummar:

Fakfeløg hava gjørt vart við, at hjá persóni, har limagjald ikki verður drigið frá arbeiðsloysisstuðlinum, er vandi fyri, at hesin limur missur rættindi til lívstrygging o.a. Fakfeløgini kunnu greiða nærri frá hesum viðurskiftum.

## 12 Arbeiðsroyndir (um møguligt minst 10 ár aftur í tíðina)

| **Arbeiðspláss:** | **Tíðarskeið (frá - til)** mð/ár mð/ár | **Arbeiðið hevur fevnt um:** |
|---|---|---|
| | / - / | |
| | / - / | |
| | / - / | |
| | / - / | |

## 13 Arbeiðsynski

| **Hvat slag av starvi kundi tú hugsað tær?** | Mint verður á, at tú hevur skyldu at átaka tær eitthvørt arbeiði, sum tú hevur fakligan førleika til. Sí leiðbeining á forsíðuni |
|---|---|
| • | |
| • | |
| • | |

## 14 Útbúgvingar

| **Heiti á útbúgving/skeiði:** | **Lærustovnur/lærumeistari/skeiðfyriskipari:** | **Byrjað** mð/ár | **Endað** mð/ár |
|---|---|---|---|
| | | / | / |
| | | / | / |
| | | / | / |

## 15 Skeið

| **Heiti á skeiði:** | **Fyriskipari:** | **Endað** mð/ár |
|---|---|---|
| | | / |
| | | / |
| | | / |

**Hevur tú trygdarskeið? JA** ☐ **NEI** ☐ **um ja, nær var skeiðið lokið:** ____________________

## 16 Teldukunnleiki

| **Hevur tú kunnleika til teldu? JA** ☐ **NEI** ☐ | | **Á hvørjum stigi?** Byrjanarstig | Brúkarastig | Víðkað stig |
|---|---|---|---|---|
| Bókhaldsskipanir | Slag av forriti/forritum: | ☐ | ☐ | ☐ |
| Tekstviðgerð | Slag av forriti/forritum: | ☐ | ☐ | ☐ |
| Rokniark | Slag av forriti/forritum: | ☐ | ☐ | ☐ |
| Annað | Slag av forriti/forritum: | ☐ | ☐ | ☐ |

ALS

## 17 Málkunnleiki

| Skilir/tosar/skrivar tú eitt ella fleiri fremmand mál? | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Byrjanarstig | Brúkarastig | Víðkað stig | | Byrjanarstig | Brúkarastig | Víðkað stig |
| Føroyskt | | | | Týskt | | | |
| Danskt | | | | Annað: ___________ | | | |
| Enskt | | | | Annað: ___________ | | | |

## 18 Koyrikort

**Hevur tú koyrikort:** **JA** ☐ **NEI** ☐ **Um ja, set**

| | | |
|---|---|---|
| ☐ A1 Motorsúkkla | ☐ C Lastbilur | ☐ E Viðfestisvognur |
| ☐ A2 Motorsúkkla v/síðurvogni | ☐ CE Lastbilur v/viðheftisvogni | ☐ Kranaførari |
| ☐ B Persónbilur | ☐ D Bussur | ☐ Trukkførari |
| ☐ Bv. Vinnuligur flutn. hægst 8 sessir | ☐ DE Bussur v/viðfestivogni | ☐ Annað |
| ☐ BE Persónbilur v/stórum viðfestiv. | ☐ Dv Vinnuligur flutningur yvir 8 sessir | ___________________________ |

## 19 Starvsøki

**Hvar í landinum kundi tú hugsað tær at starvast:** (Tú kanst seta fleiri krossar)

Mint verður á, at allar Føroyar eru ein arbeiðsmarknaður. Sí leiðbeiningina á forsíðuni

| | | | |
|---|---|---|---|
| ☐ Allar Føroyar | ☐ Norðuroyggjar | ☐ Streymoy | ☐ Vágar |
| ☐ Eysturoy | ☐ Sandoy o.a. | ☐ Suðuroy | |

## 20 Dulnevnd/ur á starv.fo

**CV títt verður skrásett á starv.fo. Ynskir tú, at arbeiðsgevarar, ið leita á starv, skulu síggja títt navn?** **JA** ☐ **NEI** ☐

## 21 Hevur tú fingið útflýggjað

| | | |
|---|---|---|
| **Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing við seinni broytingum** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| **Kunngerð um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| **Útgjaldskunngerðin** | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |

## 22 Viðmerkingar

| |
|---|
| |
| |

## 23 Váttan

Undirritaða/undirritaði gevur við hesum arbeiðsávísingini heimild at senda upplýsingar um navn og arbeiðsviðurskifti míni v.m. til arbeiðsgevarar, sum venda sær til arbeiðsávísingina við arbeiðstilboði. Eisini gevur undirritaða/undirritaði samtykki til, at mítt CV verður at finna á www.starv.fo (arbeiðsávísing á internetinum), og at arbeiðsgevarar gjøgnum www.starv.fo kunnu venda sær til mín við arbeiðstilboði. Gjørt verður vart við, at at um teigur 20 ikki er útfyltur, verður CV títt dulnevnt á starv.fo

Upplýsingarnar, latnar á umsóknarblaðnum, kunnu kannast av eftirlitinum við heimild í § 27 í Ll. nr. 113 frá 13. juni 1997 við seinni broytingum.

Eg bindi meg til at geva ALS boð um allar broytingar í viðurskiftum mínum viðvíkjandi omanfyri nevndu spurningum og annars um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri ALS.

Eg vátti undir trúnaðartreytum at hava lisið vegleiðingina á síðu 1, og at upplýsingarnar eru sannar

_____________________     ________________________________________

Dagfesting     Undirskrift

*(Víst verður til Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing við seinni broytingum og Kunngerð um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar)*

ALS

# Til arbeiðsgevaran at útfylla

**Saman við umsóknini hjá fiskimanninum skulu fyriliggja veiðiloyvi og váttan um umvæling av skipinum**

## Navn og bústaður arbeiðsgevarans

| V-tal: | Tel. / | Teldupostur |
|---|---|---|
| Navn á virkinum | | Møguligur ábyrgdarpersónur |
| Býlingur/Gøtunavn nr. | | |

| Postsmoga | Postnr. | Býur/bygd |
|---|---|---|
| | | |

## Umvæling

| |
|---|
| Nær byrja umvælingarnar av skipinum? |
| Nær væntast umvælingarnar at verða lidnar? |

## Inntøkutapstrygging

| | | |
|---|---|---|
| Verður umvælingin av skipinum fevnd av inntøkutapstrygging? | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |

## Tilknýti hjá fiskimanni til skip

| | | |
|---|---|---|
| Hevur viðkomandi verið við skipinum, áðrenn skipið fer til umvælingar? | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| Hevði viðkomandi verið við skipinum, um skipið ikki fór til umvælingar? | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |
| Skuldi viðkomandi eftir ætlan farið við skipinum, eftir at umvælingarnar eru av? | **JA** ☐ | **NEI** ☐ |

## Váttan og undirskrift

Eg vátti undir trúnaðartreytum at hava lisið vegleiðingina á síðu 1, og at givnu upplýsingarnar eru sannar

__________________ ______________________________

Dagfesting Undirskrift

*(Víst verður til Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing við seinni broytingum og Kunngerð um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar)*

**VEND**

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |

**Navn á fiskimanni**

| Føðingardagur og P-tal | Navn |
|---|---|
| | |